TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Húsaumsitingin

Húsaumsitingin hjá Tórshavnar kommunu umsitir fleiri enn 100 bygningar til fyrisiting, barnaansing, undirvísing, eldraøkið og onnur endamál.

Húsaumsitingin heldur til í gamla posthúsbygninginum í Miðbýnum í Havn.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Byggifrøðingur til Húsaumsitingina

**Arbeiðsøkið**
- at vera við í arbeiðinum at umsita kommunalar bygningar
- at skráseta bygningar
- at gera útbjóðingartilfar í samband við umvælingar og viðlíkahald av bygningum
- at hava eftirlit við arbeiðum
- at luttaka í ymiskum arbeiði á deildini

**Førleikakrøv**
- tú skalt hava útbúgving sum byggifrøðingur og tað er ein fyrimunur um tú ert lærdur húsasmiður
- royndir við tekning í AutoCAD, útbjóðing og eftirliti við arbeiðum
- førleika á brúkarastøði í niðanfyri nevndu forritum, sum kommunan brúkar
- tú skalt hava koyrikort

Húsaumsitingin brúkar telduforritið Caretaker til skrásetingar av kommunalum bygningum og kemur framyvir eisini at brúka skipanina til viðlíkahaldsarbeiðið. Harumframt verður arbeitt við word, excel, MS Project, AutoCAD, Microstation og Navision.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast møguligt eftir sáttmálanum millum Føroya Byggifrøðingafelag og Fíggjarmálastýrið. Starvið er fulltíðarstarv.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eivind Danielsen, leiðara, ella Mikael Viderø, býararkitekt, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 31. mars 2005. Merkið umsóknina "Húsaumsitingin".



# PÁSKASTEVNAN *2005*

TEMA: AT LIVA Á EGGINI

**Í Kelduni, Skálafirði.**
Á skránni verða møtir, bíbliutímar, syngið við, konsert, AWAKE XL og barnatiltøk. ***Kom og verð við!***

**TALARAR:** Pauli og Jastrid Høj, Hjørdis H. Petersen, Tummas Jacobsen, Dánjal á Dul Jacobsen, Jóni Jóhannesen, Poli Jacobsen, Einar Joensen, Símun Jacobsen, Andre Matras, Símun Absalonsen.

**FESTMØTIR** verða allar dagarnar kl 18.00, tó 2. páskadag kl. 17.00.

**MORGUNMØTIR** verða langa fríggjadag og 1. & 2. páskadag kl. 10.30.

**BARNAMØTIR** verða hvønn dag undir festmøtunum. Ymsar samkomur luttaka við leiki, dansi og sangi.

**FAMILJUMØTI** verður leygardagin kl. 15.30.

**SYNGIÐ VIÐ** verður sunnukvøldið kl. 21.30, har vit njóta teir góðu gomlu slagararnar, sum vit minnast "frá fyrr av". Húsaorkestur saman við m.a. Finnur Hansen, Petur Hans Hansen, Lisu Frederiksberg o.ø.

**MATUR:** Undir stevnuni ber til at keypa okkurt til matnað í matarhøllini.

**KONSERT:** Fríggjakvøldið kl. 21.30. Luttakarar eru Heine Lützen, Torkil Mørkøre og Credo.

**AWAKE XL:** Leygarkvøldið kl. 21.30. MEGA ungdómskvøld við lovsangi, dansframførslum, sangframførslum og Direct Level.

Keldan
*-streymar av livandi vatni*

Les meir á www.**keldan**.fo

KREA.FO - TEL 44 93 39

# Frítíðarløn 2. mai 2005

**Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai 2005.**

Eigur tú frítíðarløn, fært tú eina fráboðan.

**Býrt tú í Føroyum**
Ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer fráboðanin retur til Frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **fólkayvirlitinum** frá nýggja bústaðnum.

**Býrt tú uttanlands**
Býrt tú uttanlands, og ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer peningurin eisini retur til frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **Toll- og Skattstovuni** frá nýggja bústaðnum.

**Kontunummar**
Frítíðarlønin fyri 2005 fer á somu kontu sum í fjør. Vilt tú broyta kontunummarið, verður tú biðin um at boða okkum frá nýggja kontunummarinum.
Hetta kanst tú gera við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana **áðrenn 20. apríl 2005**. Ella tú kanst útfylla fráboðanina á heimasíðuni www.tollskatt.fo.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til okkum á telefon 37 10 51.
Vit svara mán. - hós. kl. 9.00 - 15.30, og frí. kl. 9.00 – 15.00

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (bert føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

______________ , / 2005 ______________________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast: Toll- og Skattstovu Føroya
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Snarskivan

- er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til borgara og starvsfólk.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Skrivstovufólk til Snarskivuna

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Snarskivuna at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Skrivstovufólkið kemur at taka sær av telefonmóttøku, vørubílegging, postavgreiðslu og øðrum skrivstovuuppgávum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving. Telduførleiki er kravdur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er parttíðarstarv og verður lønt í 2. lønarflokki sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mourits M. Joensen ella Helgu Hansen, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Snarskivuni, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. mars 2005. Viðmerk á umsóknina "Snarskivan"